# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Pedagogtrotið kundi verið væl minni

Í Føroyum er trot á pedagogum, verður sagt. Tað er eisini rætt, men ein partur av hesum troti er sjálvskaptur.

Ì Tórshavnar Kommunu búgva útvið 20 túsund fólk, og tað er har, at tørvurin á barnaansing er størstur. So skuldi ein trúð, at barnaansingin í Tórshavnar Kommunu var tann mest framkomna og effektiva í landinum. So er tíverri ikki. Í mun til fleiri aðrar kommunur, so megnar Tórshavnar Kommuna ikki at bjóða barnaansing í minni enn fulla tíð. Hetta merkir, at foreldur við einum avmarkaðum tørvi noyðast at fáa síni børn ansað í fulla tíð, um tey yvirhøvur skulu í kommunala ansing.

Tað høvdu verið nógv foreldur, sum høvdu tikið av, um kommunan kundi veitt barnaansing í hálva tíð ella bert nakrar ávísar dagar um vikuna. Hetta vita vit av royndum frá øðrum kommunum í Føroyum. Um Tórshavnar Kommuna fylgdi eftir, har aðrar kommunur hava slóðað, so hevði tað hækkað tænastustøðið yvirfyri borgarunum, frígivið pláss og harvið minkað um pedagogtørvin. Tað vildi verið ein bati fyri allar partar. Hóast hetta, so vil Tórshavnar Kommuna eftir øllum at døma ikki bjóða ansing í minni enn fulla tíð.

Ein kommuna eigur at gera tað, sum borgarin ynskir. Um borgarin vil hava barnaansing í minni enn fulla tíð, so eigur kommunan at levera.

Um kommunan heldur fast uppá prinsippið um bert at hava ansing í fulla tíð, so heldur hon pedagogtørvinum óneyðugani langt upp, og so er bert ein spurningur um tíð, áðrenn tað fer at loysa seg betur hjá tí almenna at lata pengarnar til barnaansing at fylgja barninum, fyri at koma pedagogtørvinum til lívs.

Eitt er vist, og tað er, at um kostnaðurin fyri barnaansing – bæði tað beinleiðis gjaldið og tann parturin, sum verður fíggjaður yvir skattin - fer uppum eitt vist, so fer tað at loysa seg betur hjá foreldrum at arbeiða minni og sjálvi skipa ansing. Hetta verður eitt roknistykki, sum tað almenna má seta seg við, um kostnaðurin fyri ansing fer ov langt upp. Um barnansingin fer uppum eitt vist, so loysir tað seg betur hjá øllum pørtum, at foreldur vera heima at ansa sínum egnu børnum, og tað vildi verið eitt afturstig fyri foreldrini og eisini fyri føroyska búskapin.

**Sosialurin**

## Til kettuhatarar og onnur, ið ikki eru tað

JONNA JUSTINUSSEN

Fyrst til M.J. Tú eigur at gera mun á heimleysum og spøkum kettum, tí kettum sleppur tú ikki undan. Ein spøk ketta og ein gamal geldur frensur hava tað fínt, tey hava ikki fyri neyðini at verða dripin. Kettufellan bleiv introducerað einaferð, tá har vóru so nógvar heimleysar kettur úti á Reyni. Heimleysar og villar kettur ført tú annars ikki fatur á. At drepa fyri hond er ikki djóravinarligt, tað er óndt. At geva nøkrum premiu fyri at drepa kettur, slíkar tankar kann bert ein sjúkur heili fostra, tað kanst tú ikki meina í álvara, heldur skuldi man givið Djóraverndarfelagnum pengar. Vit eru eitt lítið og fátækt felag, og tá kundu vit hjálpt kettunum, og menn kundu spart rottugiftina, sum rotturnar eftirhondini blíva resistentar ímóti.

Vit liva í einum samfelag, sum er fyri øll, og tíverri sleppa klikkaði fólk, hevði nærsagt fólk, ið hava rottur á loftinum, at útliva sínar sjúkligu tendensir, tí teímum framman undan ikki dáma kettur, eru óvinir við grannan, ið eigur kettuna, ella at børnini inni við síðunar av eru ótululig. Tað býtta er bara tað, at tá hendan kettan er forsvunnin, og fólk ikki vita, hvar hon er blivin av, so fáa tey sær eina aðra kettu, og so melur myllan aftur. Hetta eigur ikki at kunna finna stað. Ein ketta livir í eini 15 ár, um hon hevur tað gott, hon skal ikki skiftast út annað hvørt ár.

Heimleysar kettur kunnu ikki yvirliva leingi í náttúruni í Føroyum, men tey fólk, ið seta kettlingar við, hava ein trupulleika, tá ongin svarar uppá lýsingina um fimm fittar kettlingar, sum bert eru til djóravinir. Tá mugu tey tann tunga vegin til djóralæknan. Tíverri sleppur onkur sær undan, og deilir kettlingar út til fólk, ið faktisk ikki ynskja sær kettu. Enntá setur kettlingarnar útum og billa sær inn, at teir finna nýggj heim, meðan tey sjálvi snorksova víðari. Vit hava nøkur dømi um tað. Kettlingarnar finna onki nýtt heim, teir doyggja um ongin gevur teimum mat. Hevur tú ein frens, skalt tú fáa hann geldan, og hevur tú eina kettu, skalt tú syrgja fyri, at hon ikki fær kettlingar. Operatión er dýr, men tað er tað besta. Vit skulu fram til, at fólk ikki seta kettlingar við, uttan at onkur hevur biðið um ein. Kettur behøvast ikki at vera villar í Føroyum.

At tað eru ketturnar, ið taka allan smáfugl er ikki heilt rætt. Ketturnar fáa helst teir fuglarnar, ið á ein ella annan hátt eru veikir. At ketta og fuglur kunnu liva saman er nokk ein paradisiskur dreymur, men tá tú fært tær kettu, kanst tú velja eina, ið er ljós á litið, so fuglarnir síggja hana. Vilt tú hava fuglalív í garðinum, mást tú planta trø, so fuglarnir hava nakað at hoppa runt í og krógva seg í. Um ein fremmand ketta kemur inn um, mást tú jagstra hana burtur uttan at gera henni skaða.

Smáfuglarnir hava tað ikki lætt, teir eru føði hjá róvfuglunum. Eg havi eitt gamalt útklipp her (Ude og hjemme nr. 34, ár 2000, nú fái eg endiliga brúkt tað), her stendur, at ein høsnaheykahannur (duehøg) tekur 500 smáfuglar í yngliperioduni, tað eru einar 5-6 um dagin, pluss tað hann sjálvur skal liva av. Tað merkir at 10 høsnaheykar skulu hava minst 5.000 smáfuglar, 100 høsnaheykar skulu hava minst 50.000 smáfuglar, nei, nú svimlar....

Um vit seta likkur, krákur og ravnar í staðin fyri høsnaheykar, so er tað knappliga tankavekjandi, og alt tos um kettur tagnar. Kanska onkur kann fortelja mær, hvussu nógvir smáfuglar og dunnuungar standa á hasari kontuni.

Kettan er eitt róvdýr, tað slepst ikki undan, men hon er eisini eitt kelidýr og eitt sovidýr, svevur ella durvar 18 tímar um døgnið.

Djóraverndarfelagið er bert til, tí vit eru nøkur, ið vilja hjálpa djórunum, vilja betra um umstøðurnar, verja tey ímóti djórapínslu, tí tey kunnu jú ikki siga tað sjálvi. Vit hava ov mikið at taka okkum av, vit mangla fólk, ið hava skil fyri at skriva til myndugleikarnar um at broyta lógir, fólk til at skriva til virkir um at fáa pengar... væl at merkja, uttan at fáa eitt oyra afturfyri.

Djóravernd er umfatandi, og ofta hoyrir tú folk siga, at Djóraverndarfelagið átti at gjørt hetta ella gjørt okkurt við hatta. Jú, men djóravernd er ikki bert fyri Djóraverndarfelagið.

**P.S.** Nú eg eri við tað, skal tað nevnast, at í Nólsoy hava tey ongar rottur og hava ongantíð havt tað, bygdin eg hugsaði um, er ein onnur, eg minnist ikki hvør.
Umskylda, nólsoyingar.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.